# Bent Fabricius-Bjerre í essinum

**Hóast kendi tónasmiðurin og klaverúrmælingurin, Bent Fabricius-Bjerre, er vorðin 81 ára gamal, megnaði hann at draga mongu áskoðararnir væl og virðiliga við sær inn í tónleikaheimin, tá hann í gjár stóð á pallinum í Norðurlandahúsinum**



De Græd Trio og songkvinnan Trine Gadeberg vóru við Bent Fabricius-Bjerre á pallinum, tá kendu eyðkennisløgini rungaðu í Norðurlandahúsinum.



Millum hvørt lag greiddi Bent Fabricius-Bjerre teimum 288 áhoyrarunum gjølla frá, hvat næst var á skránni, og hvønn uppruna sangirnir høvdu.

KONSERT
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Eyðkennisløgini frá Matador, Alley Cat, Olsen Banden og Forelsket i København rungaðu í Norðurlandahúsinum seinnapartin í gjár. Kendi maðurin handan løgini – tann ungi og vælhýrdi Bent Fabricius-Bjerre – stóð í gjár fyri fyrstu ferð nakrantíð á palli í Føroyum.

Hóast Bent Fabricius-Bjerre hevur 81 ár á baki, stendur hann ikki í stað, men leitar áhaldandi eftir nýggjum avbjóðingum. Eitt nú er hann nýtrúlovaður við 38 ára gomlu Camillu Arndt. So hóast høgan aldur stendur hann heldur ikki í stað á hesum økinum.

Við sær á pallinum í Norðurlandahúsinum í gjár hevði Bent Fabricius-Bjerre De Græd Trio, sum hann hevur spælt saman við í átta ár. Somuleiðis sang songkvinnan, Trine Gadeberg, við í fleiri songum.

Í Sosialinum í morgin verður ummæli av konsertini.

